# Rækjuskip fáa eyka fiskidagar á Flemish Cap

**Jørgen Niclasen hevur á fundi í Grønlandi tryggjað teimum føroysku rækjuskipunum nakrar eyka fiskidagar á Flemish Cap, um allir dagarnir har verða brúktir**

FISKIDAGAR
*Stefan í Skorini*



*Jørgen Niclasen hevur gjørt avtalu við grønlendska landsstýrið um, at føroysk rækjuskip kunnu fáa fiskidagar frá teimum á Flemish Cap*

Um tey føroysku rækjuskipini nýta allar sínar fiskidagar á Flemish Cap, so er møguleiki fyri at fáa nakrar fiskidagar afturat frá grønlendingum.

Hetta samráðingarúrslitið kom landsstýrismaðurin við fiskivinnumálum fram til, tá hann í døgunum 28.-30 august var á almennari vitjan í Grønlandi. Jørgen Niclasen samráddist við Simon Olsen, sum er grønlendskur landsstýrislimur.

Landsstýrismaðurin heitti á grønlendingar um at lata burturav sínum fiskidøgum á Flemish Cap í hesum fiskiárinum. Afturfyri vilja Føroyar lata grønlendskum skipum veiðimøguleikar, sum ikki verða nýttir av føroyskum skipum. Henda skipanin fer tó ikki at broyta innanhýsis býti av fiskidøgum millum londini framyvir.

### Mangla fiskidagar

Sum er hava føroysk skip 1440 fiskidagar á Flemish Cap. Av hesum eru longu 1150 dagar brúktir. Tað bendir tí á, at føroysku rækjuskipunum fer at vanta fiskidagar móti endanum av árinum.

Grønland hevur 460 fiskidagar á Flemish Cap, men hesir verða neyvan gagnnýttir, og tí hevur Grønland gingið við til at lata føroyingum nakrar dagar.

Jørgen Niclasen hevur fingið tilsøgn um hesar fiskidagarnar frá grønlendingum, og um føroysku skipini brúka allar sínar dagar, so fer landsstýrismaðurin at søkja um fiskidagarnar.

Jørgen dylur ikki fyri, at hann er sera fegin um hesa avtaluna, og hon vísir tað góða samstarvið, sum er millum Føroyar, Grønland og Ísland.

### Væleydnað samstarv

Í fjør gjørdu londini bæði avtalu um, at føroysk og grønlendsk reiðarí kunnu samstarva innan rækjuveiðu. Talan er um leigusáttmála, har grønlendsk reiðarí leiga føroysk skip við manning. Avtalan er tískil ikki at meta sum kvotur, tí grønlendsku reiðaríini skulu eisini hava sína úrtøku.

Soleiðis hava seks føroysk rækjuskip fingið møguleika at royna eftir rækjum í Vesturgrønlandi, har góðskan á rækjunum er væl betri enn á Flemish Cap.

– Henda avtalan fellur á eitt turt stað, tí rækjuprísurin er í botni. Hetta er tískil ein kærkomin møguleiki hjá føroysku rækjuskipunum at víðka um veiðumøguleikarnar, sigur Jørgen Niclasen.

Støðan er tann, at Føroyar hava ein ov stóran veiðikapasitet, meðan Grønland hevur ov fá skip. Hann sigur, at avtalan er gjørd við tí fyri eyga, at føroyingar kunnu nýta sítt skipatilfeingi til fulnar, meðan grønlendingar samstundis kunnu fáa nakað burturúr óbrúktum rættindum.

Onnur mál vórðu eisini umrødd á fundinum, og teir blivu samdir um, at fylgisveinaeftirlit verður sett í verk, og avtala verður gjørd um hetta seinni.




# Føroyar skal hava samráðingarleiðsluna

**Føroyar og Grønland eru samd um, at tey skulu hava samráðingarleiðsluna í altjóða hvalaveiðunevndini, IWC. Danmark tekur sær í løtuni av samráðingunum í IWC, og tað eru Føroyar og Grønland ónøgd við**

HVALAVEIÐA
*Stefan í Skorini*

Føroyar eru bara við sum eygleiðarar í altjóða hvalaveiðunevndini. Danmark hevur samráðingarleiðsluna. Ein danskur embætismaður tekur sær av føroyskum og grønlendskum áhugamálum í nevndini.

Á fundi í Grønlandi millum Jørgen Niclasen og Simon Olsen, landsstýrislim, vóru londini samd um, at henda skipanin ikki er nøktandi fyri londini bæði. Tí fara tey at arbeiða fyri at fáa størri ávirkan á samráðingarnar.

Víst verður á felagsskapirnar NAFO og NEAFC, har Grønland og Føroyar hava samráðingarleiðsluna uttan innblanding frá Danmark.

Orsøkin til at Danmark yvirhøvur kom við í IWC var, at Føroyar og Danmark veiða hval. Tí eigur danskur umhvørvispolitikkur ikki at koma til sjóndar í hesi nevndini, men áhugamálini hjá Føroyum og Grønlandi skulu verjast, var niðurstøðan um hetta málið.

Danska stjórnin hevur higartil tikið undir við friðing og hvalaveiðubanni, ístaðinfyri at birta uppundir burðardygga veiðu, sum Føroyar og Grønland hava ætlanir um at fara undir.

Jørgen Niclasen, landsstýrismaður við fiskivinnumálum, sigur, at landsstýrið fer at taka eina avgerð viðvíkjandi hvalaveiðu, tá hvalateljingarnar og vísindaligu kanningarnar av stovninum eru lidnar.

# Høgni Hoydal fer at samráðast um yvirtøkur

**12. september fer landsstýrismaðurin í sjálvstýrismálum at samráðast við danska løgmálaráðharran, Frank Jensen, um yvirtøku av løgregluni og rættarskipanini**

YVIRTØKUR
*Stefan í Skorini*

Mikudagin verður fundur millum Høgna Hoydal og Frank Jensen um støðuna í sjálvstýrismálinum.

Tað var í mai mánaði, at Høgni Hoydal bað um fund við danska løgmálaráðharran. Endamálið var at leggja til rættis mannagongdina og framtíðar samstarvið, tá familjurættarliga lóggávan, løgreglan og rættarskipanin koma undir føroyskt ræði, soleiðis sum landsstýrið hevur samtykt. Hetta sigur Høgni Hoydal í tíðindaskrivi.

Tá svaraði danska stjórnin, at hesi mál ikki kundu gerast føroysk uttan so, at heimastýrislógin verður broytt, og tí ynskti stjórnin ongan fund um málið.

Høgni Hoydal boðaði síðani frá, at hann ikki var samdur við dønum í hesum máli, og at hann fór at halda seg til løgtingssamtyktina. Tí hava fyrireikingarnar um yvirtøkur hildið fram, og nú hevur danska stjórnin játtað at taka upp samráðingar.

Fundurin teirra millum verður 12. september í Keypmannahavn.



# Við fullari ferð til Gásadals



**Arbeiðið upp á Gásadalstunnilin er nú farið rættiliga í gongd, og arbeitt verður nú út í eitt, til komið er ígjøgnum**

TUNNILSGERÐ
*Edvard Joensen*

Farið er nú veruliga í gongd við arbeiðinum upp á Gásadalstunnilin, og væntandi verður komið ígjøgnum komandi ár. Skotið er upp at seta teir pengar, sum skulu til, á komandi fíggjarlóg.

Arbeiðið hevur ligið stilt vegna summarfrí frá tí, fyrsta skotið varð latið av í summar, men er nú tikið uppaftur.

Tað verður arbeitt í einari vakt, sigur Erik Joensen á Landsverkfrøðingsskrivstovuni. Einir 10 mans arbeiða í løtuni í tunnlinum. Men tað kann henda seg, væntar hann, at onkur kemur afturat.

Í ár eru settar sjey milliónir krónur av til boringina, og tað vænta tey hjá Landsverkfrøðinginum fer at røkka árið út. Einar 200-300 metrar væntar Erik Joensen, at teir fara at klára at bora í ár. Samlaða longdin er 1.400 metrar. Tað eru einir 300 metrar styttri enn upprunaliga ætlanin segði. Tað kemst av, at í mun til upprunaligu ætlanina er tunnilin nú fluttur longri niðan í dalin, har roknað varð við, at tilfarið í fjallinum er betri.

– Og tað er júst tað, sum royndarboringarnar hava víst, sigur Erik Joensen. Teir hava borað niður í fjallið við báðar endarnar, og tað sær út til at vera rættiliga gott tilfar, sum skuldi verið lætt at arbeitt við.

### Somu játtan

– Fáa vit somu játtan á komandi fíggjarlóg sum í ár, koma vit ígjøgnum næsta ár, sigur Erik Joensen.

Og tað er okkurt, sum bendir á, at soleiðis verður, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður við samferðlumálum.

Hann sigur, at metingin er, at einar átta milliónir skulu til afturat teimum, sum játtaðar eru í ár, fyri at skjóta ígjøgnum. Og tær standa í uppskotinum til komandi fíggjarlóg.

Hesir pengarnir, talan er um, eru bara til at skjóta ígjøgnum fyri, sigur Bjarni Djurholm. Tá komið er ígjøgnum, er eftir at gera vegirnar báðu megin við tunnilin lidnan, eins og portalar skulu stoypast, og tunnilin skal tryggjast innan.

Men hóast tað er Landsverkfrøðingurin sum stendur fyri boringini, veðrur tað ikki hann, sum skal gera arbeiðið liðugt, sigur landsstýrismaðurin. Tað arbeiðið er ætlanin at bjóða út, sigur hann.

Væntandi fer samlaði kostnaðurin fyri Gásadalstunnilin at liggja um einar 30-40 milliónir krónur.

Vegurin oman til Gásadals verður umleið hálvanannan kilometur, sigur Erik Joensen á Landsverkfrøðingsskrivstovuni.

Um sjálvan tunnilin sigur hann, at hann fer at líkjast Kunoyartunnlinum. Ein eittsporaður vegur verður at koyra eftir, og ikki er ætlanin at hava ljós inni.

### Grótið

Grótið úr tunnlinum veðrur í fyrsta umfarið tikið út og goymt Bíggjarmegin, sigur Erik Joensen. Síðan skal tað brúkast til vegagerðina oman til Gásadals. Í Gásadali er einki grótbrot at fara í, og ikki verður mett skilagott at fara at gera eitt nýtt, um tað slepst undan.

Tó samsvarar hendan ætlanin ikki heilt við tað, Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, fyrr hevur nevnt um, at hetta grótið kundi verið brúkt í sambandi við útbygging av flogvøllinum.

Men Bjarni Djurholm sigur í dag, at umstøðurnar tykjast eitt sindur øðrvísi nú, enn tá hann úttalaði seg um hetta málið seinast.

Nýggjar metingar vísa, at grótið úr Gásadalstunnlinum verður helst ov lítið til leingjan av flogvøllinum, so tað skal kortini flytast grót aðrastaðni frá. Tá so er, er eingin grund til fyrst at flyta grótið úr Áardali á flogvøllin, fyri síðan at fara aðrastaðni eftir meira. Og so oman á alt at flyta grót aftur til Gásadalsvegin. So har verður helst, sum teir hjá Landsverkfrøðinginum meta, at tunnilsgrótið fer undir vegin.

Hinvegin hevur so verið nevnt, sigur Bjarni Djurholm, at grót úr undirsjóvartunnlinum kann brúkast til flogvøllin.

Men har siga metingarnar nú, at tað verður helst ov dýrt í flutningi og sliti av vegum og so framvegis til, at tað fer at loysa seg.

– So tað verður helst til tað, sigur landsstýrismaðurin, at eitt nýtt grótbrot verður gjørt nærindis flogvøllinum, sum grótið til útbyggingina so kann takast úr.

## Føroya Banki lækkar rentuna

Sum avleiðing av, at Danski Tjóðbankin hevur lækkað diskontoina við 0,25 pst., so lækkar Føroya Banki sínu rentustig. Rentulækkingarnar koma í 10. september.

Runtustigini á útláni verða í høvuðsheitum lækkað 0,25 pst., tó soleiðis, at rentan á húsaláni við 2. veðrætti lækkar við 0,50 pst. Rentan fyri 1. veðrættarlán í Føroya Banka verður eftir hetta 5,75 pst.

Ì sambandi við rentubroytingina hevur bankin innført ein nýggjan prísbygnað á billáni. Bankin sigur, at við einum útgjaldi á í minsta lagi 40 pst. kann rentuupphæddin av einum nýggjum bili fíggjast við eini rentu á 6,50 pst. í Føroya Banka. Er útgjaldið 25 pst. er rentan 7,5 pst.

Ein onnur avleiðing er eisini, at rentumunurin, sum hevur veirð millum 3 og 12 mánaðar uppsøgn av innlánum, er nú burtur. Sum avleiðing av hesum verður longsta uppsagnartíðin á innláni í Føroya Banka í framtíðini 3 mánaðir.

Rentan á flestu innlánssløgum verður lækkað við 0,50 pst. Tó lækkar rentan á innláni uttan uppsøgn við 0,15 pst. Fyri innlán við 3 mánaða uppsøgn verður tað ikki nøkur rentu lækking, um saldoin er undir 300.000 kr. Rentan á innláni yvir 300.000 kr. verður lækkað við 0,25 pst.

**-hr**

Landsfundur Javnaðarfloksins
í Vestmanna 14. og 15. september